# Kunningarskriv til løntakarar

## Broyting í kontoavritum í samb. við umlegging

Í samband við at peningastovnarnir umleggja NetBanka-, HeimaGreiðslu-, NetGreiðslu- og Spar2 skipanirnar frá Elektron til annan KT-veitara mánadagin 10. mai 2010, verður broyting í kontoavritinum yvir tey automatisku gjøldini.

Gjøldini eru:

- Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald (AM-gjald)
- Barsilsgjald
- Gjald til ALS
- Heilsutrygdargjald
- Skattur

Eftir 10. mai verður lønarflytingin á kontoavritinum í nýggjum hami. Á kontoavritinum í heimagreiðslunum fer bert nettolønin at síggjast –skattur og onnur gjøld, ið verða automatiskt trekt av síggjast ikki longur. Tó verður møguleiki at síggja útgreiningina við at trýsta á **nærri lýsing**, sum sæst útfyri linjuni **løn**, sí myndina niðanfyri.



Dømi um útgreining




Fært tú kontoavrit sendandi við posti frá peningastovnunum er fylgisskjal lagt við, sum vísir lønina og útgreiningina av gjøldunum, ið automatiskt verða trekt av lønini

Eru ivamál, kanst tú seta teg í samaband við TAKS á tlf. 35 26 00 ella senda ein teldupost til taks@taks.fo

Meira kunning fæst á infoportalinum hjá Elektron: elektron.fo/umlegging

TAKS

7. mai 2010